Donsk systkin:

Funnu føroysku barna

Donsku systkini Jørgen og Else kundu ikki gloyma teirra barnagentu, tey høvdu havt undir krígnum í Føroyum. Nú hava tey øll verið í Føroyum og ferðast

Dansk føroysk vinalag

Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Herfyri høvdu vit í Miðvikuni frásøgn um danska amtmanssonin Hans Ringberg, sum var á vitjan í Føroyum. Meira enn 70 ár eftir, at hann er farin úr Føroyum, kennist tað framvegis sum at koma "heim" at síggja klettarnar aftur. Tað sama var galdandi fyri systir hansara Ásu

Hetta er kortini ikki nakað eindømi. Nú um dagarnar hittu vit donsku systkini Jørgen og Else f. Hansen, sum búðu í Føroyum undir krígnum, og sum fóru avstað aftur til Danmarkar fyri 64 árum síðani. Tey kenna seg framvegis drigin at Føroyum. Hesa kenslu hava tey, hóast Else ongantíð hevur verið aftur, og Jørgen bert hevur verið eina ferð síðan tey í 1945 fluttu aftur til Danmarkar.

Henda søgan byrjar við, at danin Johannes Dewald Hansen mest sum til stuttleika søkir starvið sum amtslandinspektør í Føroyum. Hetta hevur verið eitt slag av forleypara fyri Matrikulstovuna, sum var stovnað í 1948. Heilt óvæntað fær hann arbeiðið.

Johannes var tá trúlovður við Helgu, sum dámdi væl hesa avbjóðing. Men tey máttu giftast, áðrenn tey fóru. Her mátti gerast skjótt av, so tey giftast tann 3. februar 1936, sum tey fara til Føroyar dagin eftir tann 4. februar.

Tey leigaðu sær eini hús úti á Rundingi. Tað vóru beint har Bacalao, nú Føroya Fiskavirking, er. Hesi húsini eru tískil burtur í dag.

F.v. Barnagentan Gudrun saman við Winnie, Jørgen, Turid, Else og Súsannu, sum Gudrun er abbasystir til. Tey eru ein góð mynd av føroyskum-donskum vinskapi

Aftaná tvey ár fingu tey ein son, sum fær navnið Jørgen. Tey fara eitt skifti aftur til Danmarkar, men tey koma aftur, áðrenn Danmark og Føroyar verða hersett fyrst í apríl 1940, og sambandið millum londini verður kvett. Tey komu tá í somu støðu, sum nógvir føroyingar í Danmark. Einasta samband við ættina í Danmark var Reyða Kross brøv, har tað hægst kundu vera 25 orð. Ofta tók tað eisini langa tíð hjá hesum brøvum at koma fram. Tey skuldu sendast um uttanveltað lond.

Men tey høvdu tað kortini framvegis gott í Føroyum, og í 1941 fáa tey so eina dóttir, sum fær navnið Else.

Gudrun verður barnagenta

Tey komu tá at hava brúk fyri barnagentu. Her komu tey heilt væl fyri. Johannes arbeiddi í Arnes Minde í Bringsnagøtu, oman móti Bryggjubakka. Ein ørindagenta hjá teimum var tann tá um 12 ára gamla Gudrun, dóttir Margrethu og Theodor Samuelsen, seinni kendur sum "Kongelig Lods".

Hon kom so at vera barnagenta hjá teimum báðum systkjunum, tá ið tørvur var á tí. Hon spældi við tey, tá ið tey ikki vóru í barnagarði, sum var hjá Nonnunum, og annars var hon um tey, tá ið høvið beyðst. Sum tað skilst riggaði hetta stak væl, og tey blivu sera góð.

Serliga Jørgen minnist mest frá sínum barndómi í Føroyum, sum jú var merktur av bretsku hersetingini. Úti á Rundingi høvdu tey eisini hønur. So tað hendi seg, at hann tók egg úr reiðrinum og fór út til bretsku hermenninar, sum húsaðust við gamla landsbókasavnið at lata teimum. Aftur fyri fingu tey sukurlátu og annað forkunnugt góðgæti. Hetta var í sær sjálvum sera spennandi, og tað vóru nógv føroysk børn, sum royndu tað sama.

Tey minnast eisini grindadráp á Eystaru Vág, og hvussu grindin varð býtt. Men serliga minnast tey grindakúlurnar, sum vóru lagdar í eini rød úti á Rundingi. Tær skuldu brúkast til taðing. Sum fráleið gjørdist lukturin ramari og ramari!

Rundingur hevði sítt navn eftir eini ríðibreyt, sum eigararnir av fabrikkini hjá Østrøm høvdu bygt stutt fyri aldamóti. Her var eisini fiskaturking í nógv ár.

Úti har var annars eisini fyrsta elverk í Havn. Her vóru ymisk út- og pakkhús. Á Rundingi byrjaði Elias í Rættará eisini at smíða bátar, og her byrjaði Skipasmiðjan við Kjartan Mohr eisini sítt virksemi.

Rýmdu undan bumbum

Tað var nógv virksemi á Rundingi. Men tað, sum tey hjá Jørgen og Elsu tó høvdu mestan ampa av, var, at tey búðu so tætt at oljutangunum, og teir vóru jú uppløgd mál hjá týskum bumbuflogførum.

Tað vóru fleiri álvarslig bumbuálop á Havnina fyrst undir krígnum. Men serliga gav hetta at býta 21. februar 1941, tá ið tvey týsk bumbuflogfør gjørdu álop á skip og oljutangar í Havn. Tað var hendan dagin, at Lincoln City varð søkt. Við vóru 27 mans. Við skjótum atburði frá landi eydnaðist at bjarga 18 av manningini. Eitt av flogførunum varð eisini rakt av luftverjukanónum og neyðlendi á Gøtuvík.

Serliga atsóknin at oljutangunum gjørdi tað ov ótrygt at búgva á Rundingi, og tey komu tá eina tíð at búgva hjá Heina Clementsen, ættaður av Skarvanesi, og sum búði í Hornabø. Kona hansara var "Kyll," sum hon var kallað. Hetta komst av, at hon var so krúllut, sum smágenta. Hon vildi kallað seg "kryll", men tað gjørdist til "kyll."

Tað vóru nógv fólk sum flutti, eisini út Havnini.

Í hesi støðu vísti tað seg, at har tað er hjartarúm er eisini húsrúm.

Sosialurin